## Krevja betri fólkaskúla

Grønlendska arbeiðsgevarafelagið vil hava politikararnar at leggja nógv størri dent á fólkaskúlan enn nú. Í einari áheitan á politikararnar sigur felagið, at neyðugt er at bøta um umstøðurnar í skúlanum fyri at fáa lærararnar at støðast, tí eitt nútímans samfelag kann ikki liggja í støðugum læraratroti, sigur felagið. GA leggur afturat, at tað er avgerandi fyri vinnulívið, at tey ungu eru væl fyrireikað og búgvin, tá tey koma úr skúlanum.



## Hergeir fekk fyrsta startpakkan

**Klaksvík:** Hergeir Carlsson var tann fyrsti, ið fekk ein startpakka frá Klaksvíkar kommunu. Tað var borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen, ið handaði »nýggja« klaksvíkinginum henda fyrsta startpakkan, nú hann við húski er fluttur til Klaksvíkar kommunu. Hergeir er 33 ára gamal, giftur við Lillian Lassen og hava tey trý børn. Hergeir starvast hjá Norðhús. Um hesa skipanina við startpakkum sigur Hergeir sjálvur við heimasíðuna hjá Klaksvíkar kommunu: - Eg haldi tað er veldugt við hesum startpakkunum, tí hetta er nakað sum øll familjan fær gleði av! Tey eru serliga fegin um at til dømis hava fingið eitt svimjikort, sum børn nini kunnu brúka.

# Alt fleiri fyritøkur á húsagang

**Hagtøl yvir danskar fyritøkur vísir, at alt fleiri fara av knóranum. Og sama gongdin sæst eisini aftur í føroysku hagtølunum. - Vit hava sent methøgt tal av innheintingarbrøvum út hesa vikuna, sigur Jákup B. Jensen, stjóri í Intrum Føroyar**

HÚSAGANGIR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Fyritøkan Intrum Føroyar, har Jákup B. Jensen er stjóri, hevur sent metnógv innheintingarbrøv út í farnu viku, fleiri enn eitttúsund*

Tað er ein greiður vøkstur í talinum av húsagangum innan donsku fyritøkurnar.

Tað skrivar danska blaðið Børsen, sum vísir til hagtølini fyri januar mánað í ár sammet við sama mánað í fjør. Húsagangirnir í januar í fjør vóru 182, meðan talið fyri januar í ár er 241. Tað er ein vøkstur upp á 32, 4%

Fyri árið februar 2006-januar 2007 er samlaða talið 2.016 húsagangir sammett við 2.445 fyri árið februar 2007-januar 2008.

Blaðið hevur eisini tosað við fleiri sakførarafyritøkur sum vátta, at tær hava nógv meiri at gera innan konkurssakir enn fyrr.

Talið á húsagangum hevur ongantíð verið so høgt tey ellivu árini, analysufyritøkan Experian hevur gjørt mánaðligar konkursanalysir.

Í Danmark stendur ringast til innan handil og byggivinnu, har tølini fyri húsagang í januar í ár vóru ávikavist 55 og 52.

Experian roknar við at sama gongdin fer at halda sær í eina tíð aftrat.

Børsen kemur ikki nærri inn á orsøkirnar til mongu húsagangirnar, men tað er ein sannroynd, at partvís hevur peningur verið lætt atkomiligur hjá seliga ungum, sum fáa í boði at taka lán umvegis fartelefonina, og partvís lata handlar fegnir vøru upp á borg.

### Sama gongd her

Verður hugt at føroysku tølunum síggja vit, at sama gongdin vísir seg eisini her. Í 2000 var talið 57, í 2002 87, í 2005 var talið komið upp á 116, í 2006 122 og í fjør var talið so komið upp á heili 150 húsagangir. Ella rættari sagt strikað feløg, so tað er ikki púra víst, at øll eru farin á húsagang; íroknað eru eisini feløg, sum bara eru givin.

Men uttan mun til tað, er vøksturin týðiligur.

Skrásett feløg í alt í Føroyum pr. 31-12-2007 vóru 2833. Talan er í nógv mestan mun um smápartafeløg, sum eru 2238 í tali. Næst koma partafeløg, sum eru 568 í tali. Umframt hetta eru 16 filialar, tíggju grunnar og ein sparikassi.

Hóast talið av strikaðum feløgum er støðugt vaksandi, so er hetta einki fyri at rokna móti stovnaðum feløgum. Í fjør vórðu heili 478 nýggj feløg skrásett, 426 smápartafeløg, 51 partafeløg og ein filialur.

- Men tað er gongdin við strikaðum feløgum, sum er órógvandi, og økjandi talið hongur væl saman við mongdini av innheintingum, sum vit senda út, sigur Jákup B. Jensen, stjóri í innheintingarfyritøkuni Intrum Føroyar.

Hann sigur, at farnu vikuna setti fyritøkan met í útsendum innheintinum, tá talið á brøvum fór upp um eitttúsund.

### Leggja ov nógv fyri

Methøga talið av innheintingarbrøvum, sum nú eru send út, kemst helst av jólasøluni.

- Jólasølan hevur verið serstakliga stór í fjør, og fólk hava helst spent boga ov høgt. Tá tað so nú eru stundir at gjalda rokningina, megna fólk tað ikki, heldur Jákup B. Jensen.

Nakað annað, sum er órógvandi, eru nýggju gjaldskortini, tey sonevndu e-kortini ella masterkortini.

- Eg havi tosað við fleiri handlar, sum gremja seg um hesi nýggju gjaldskortini. Tey virka nú á tann hátt, at tá rindað verður við teimum, ganga 28 dagar áðrenn handilin fær peningin, og tað sigur seg sjálvt, at tað tyngir almikið um likviditetin, sigur Jákup B. Jensen.

Hartil kemur so eisini, at tað er ógvuliga dýrt at nýta hesi kortini, tí rentan er heili 14%. Tær sonevndu gjaldindex-kanningarnar, sum altjóða Intrum fyritøkan ger tvær ferðir um árið, og sum eisini Intrum Føroyar er farið undir at gera, vísa, at føroyingar liggja í tunga endanum, tá tað ræður um at gjalda rokningar. Og tað ávirkar sjálvandi eisini raksturin hjá handlum og fyritøkum.

- Vit fara nú undir at gera nýggja gjaldsindexkanning. Hetta er so aðru ferð vit gera hesa kanning, sum frameftir skal gerast tvær ferðir um árið. So tað verður spennandi at síggja, um støðan er nakað broytt frá fyrstu kanningini, sigur Jákup B. Jensen.